Kappingareftirlitið

Per Aarsleff Holding A/S
Hasselager Allé 5
8260 Viby J

Att. Carina Czerwinski Dall

Tórshavn, tann 24-02-2025

Viðv. mál nr.: 25/00043

Kappingareftirlitið fekk tann 21. januar 2025 einfalda fráboðan, sbrt. § 14, stk. 1, nr. 2, um at Per Aarsleff Holding A/S ognar sær upp til 90% av partapeninginum í P/f Articon.

Talan er um eina transaktión sum  kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí minst ein av luttakandi fyritøkunum hevur ein árligan umsetning í Føroyum á minst 75 milliónir krónur, og minst ein av hinum fyritøkunum hevur ein umsetning á minst 75 milliónir krónur á heimsstigi, sbrt. §14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí fráboðað er eftir § 14, stk. 1, nr. 2, sbrt. § 3, stk. 1, nr. 6, í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025. Fráboðan eftir § 3, stk. 1, nr. 6, í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 er treytað av, at bert ein av luttakandi fyritøkum hevur ein umsetning í Føroyum, sum er hægri enn 15. mió.kr. Ásetingin hevur við sær, at feløg sum virka á marknaðum uttanfyri Føroyar, kunnu fráboðað eftir einfaldum leisti, um feløgini einki ella einans hava avmarkað virksemi í Føroyum. Avmarkað virksemi svarar til ein umsetning undir 15 mió.kr. um árið.

Per Aarsleff Holding A/S er ein fyritøka, ið átekur sær arbeiðið innan bygging og verklag. Felagið er skipa sum eitt samtak við fleiri dótturfeløgum, sum í høvuðsheitinum arbeiða sjálvstøðugt. Per Aarsleff Holding A/S hevur heimstað í Danmark, men hevur eisini virksemi í øðrum londum. Felagið hevur avmarkað virksemi í Føroyum, har fyritøkan hevur havt einstakar uppgávur innan reinsing og endurnýggjan av kloakkum. Per Aarsleff Holding A/S átekur sær serliga uppgávur innan bygging, tekniskar installatiónir, jarnbreytir, fundament og rør arbeiðið.

P/f Articon er ein fyritøka, ið átekur sær uppgávur innan bygging í breiðari merking. P/f Articon hevur arbeitt miðvíst eftir at kunna loysa allar uppgávur innan bygging, bæði sum høvuðsarbeiðstakari og sum undirveitari. Hetta verður gjørt við góðum samstarvsfeløgum í Føroyum og uttanlanda. P/f Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur-

og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. P/f Articon hevur virksemi í Føroyum og avmarkað virksemi í Grønlandi.

Samanleggingin er skipa á tann hátt, at eftir niður- og avkapitalisering av P/f Articon, teknar Per Aarsleff Holding A/S 80% av partapeninginum í P/f Articon fyri 144. Mió.kr., meðan lyklapersónar tekna 10% av partapeninginum og núverandi eigaranar av P/f Articon, P/f Articon Holding, tekna 10% av partapeninginum. Við avtaluni hevur Per Aarsleff Holding A/S skyldu at tegna 10% aftrat av partapeninginum, soleiðis at ognarluturin hjá Per Aarsleff Holding A/S verður 90% av partapeninginum í P/f Articon.

*Um vørumarknaðin*

Byggivinnan er ein sermerktur marknaður, sum er skipaður við einum felagsheitið fyri fleiri smærri marknaðum. Eisini skal hædd takast fyri, at P/f Articon virkar á einum marknað fyri heildar- og høvuðsarbeiðstøku, har uppgávurnar verða framdar av verktakaranum, ið møguliga nýtir undirveitarar. Marknaðurin fyri heildar- og høvuðsarbeiðstøku er eyðkendur við tað, at hóast undirveitarar kunnu veita somu tænastu, er tað ósannlíkt at tær kunnu átaka sær leiklutin sum heildar- ella høvuðsarbeiðstakari.[1] Av somu orsøk er virksemi hjá Per Aarsleff Holding A/S í Føroyum og P/f Articon ikki samanfallandi í tann mun, at tað krevur nærri støðutakan til vørumarknaðin og marknaðarpart.

Virksemi hjá Per Aarsleff Holding A/S í Føroyum gevur tí ikki illgruna um, at yvirtøkan átti at verið kannað nærri.

*Møguligir kappingarneytar*

Av tí at talan er um eina yvirtøku millum feløg, sum arbeiða á sama vørumarknaði og í avmarkaðan mun á sama landafrøðiliga marknaði, skal Kappingareftirlitið meta um, hvørs yvirtøkan lýkur treytirnar í reglunum um møguligir kappingarneytar, sbrt. vegleiðingini hjá ES-Kommissiónini (2004/C 31/03), um vantrættar samanleggingar. Vegleiðingin skal brúkast til at meta um, hvørs yvirtøkan skal góðkennast ella noktast. Ein yvirtøka sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, sbrt. § 15, stk. 2, í kappingarlógini, skal góðkennast.

Sambært vegleiðingini hjá ES-Kommissiónini (2004/C 31/03), skulu tvær treytir vera uppfyltar, fyri at talan er um ein møguligan kappingarneyt, sum munandi forðar fyri virknari kapping. Hesar treytir eru 1) at møguligi kappingarneyðtin hevur ein avmarkaðan ávirkan ella sannlíkt at tann møguligi kappingarneyðtin verður ein effektivur kappingarneyti 2) Avmarkað tal av øðrum møguligum kappingarneytum, sum høvdu kunna varðveitt nøktandi trýst á kappingina.

Út frá einar heildarmeting, við støði í viðkomandi marknaði hjá Per Aarsleff Holding og P/f Articon, er tað ósannlíkt, at samanleggingin kemur undir tær treytir, sum ES-Kommissiónin hevur sett. Hetta er tí at Per Aarsleff Holding A/S hevur avmarkað virksemi á føroyska marknaðinum, og at tað eru fleiri virknir aktørar á føroyska byggivinnuni og tað ikki er óhugsandi, at aðrar norðurlendskar fyritøkur síggja Føroyar sum ein viðkomandi marknað.

---

[1] Avgerð eftir Danska Kappingareftirlitið tann 25. april 2001, um samanlegging av HMT Entreprenor A/S, s. 4

Kappingareftirlitið

Tískil er samanleggingin ikki mett at forða munandi fyri virknari kapping.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna avtaluna hjá Per Aarsleff Holding A/S, ið ogna sær 90% av partapeninginum í P/f Articon, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini, um at ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friðuson Andreasen
Fulltrúi